## Navnauppskot:

# Margitar barnagarður

**Verður tað upp til varaborgarstjóran í Klaksvík, Jákup Mikkelsen, skal nýggi barnagarðurin í kommununi eita Margitar barnagarður**

NAVNAUPPSKOT
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Varaborgarstjórin í Klaksvíkar býráð, Jákup Mikkelsen, ætlar at leggja uppskot fyri sosialu nevnd, um at nýggi barnagarðurin á Traðargøtu í Klaksvík fær navnið Margitar barnagarður, veit heimasíðan hjá Klaksvíkar Kommunu at siga.

### Margit var drívmegin

Verður navnauppskotið samtykt, verður barnagarðurin uppkallaður eftir Margit Joensen, sálu. Hon var fyrstvalda kvinna í Klaksvíkar býráð og forkvinna í sosialu nevnd, tá verkætlanin fór av bakkastokki fyri umleið 20 árum síðani. Harafturat var Margit Joensen drívmegin í arbeiðsbólkinum, sum fyriskipaði hesa verkætlan saman við Tróndа Fuglø arkitektum.

Barnagarðurin á Traðargøtu letur upp 17. september. Dagurin verður søguligur, við tað at hetta er fyrsti barnagarður, sum Klaksvíkar Kommuna letur byggja

Pláss er fyri 64 børnum í nýggja barnagarðinum. Hetta merkir, at Klaksvíkar Kommuna nú er við nøkta ansingartørvin í kommununi.

Í komandi viku verða allar starvsfólkasetaninar komnar undir land, og tey børn, sum fáa pláss, hava fingið fráboðan.



*Barnagarðurin á Traðargøtu er fyrsti barnagarður, ið Klaksvíkar Kommuna letur byggja*

TRYGD • TÆNASTA • TRIVNAÐUR
- størri TRYGGLEIKA í ferðsluni

SKRIVSTOVUFÓLK

**Søkt verður eftir skrivstovufólki til Akstovuna til at byrja skjótast tilber. Talan er um parttíðarstarv.**

UPPGÁVAN
Uppgávan fevnir m.a. um:
- Avgreiðslu av viðskiftafólki og telefonavgreiðslu
- Sýnsumsiting

FØRLEIKAKRØV
Vit hugsa okkum ein persón við skrivstovuútbúgving, HH ella líknandi útbúgving og arbeiðsroyndum á skrivstovu. Dentur verður lagdur á at ein hevur góð samstarvsevni og at viðkomandi er fyrikomandi og tænastuhugaður. Kunnleiki at arbeiða við teldu er eisini ein treyt.

SETANARTREYTIR
Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Starvssetanin hoyrir undir Vinnumálaráðið við tilhoyrandi stovnum, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráð.

Upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Jákup Jacobsen, stjóra, á telefon 350400.
Umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skulu verða okkum í hendi í **seinasta lagi 20. august 2007.**

*Akstovan er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur sum endamál at fremja akfaratøkniligar kanningar og akfaraeftirlit, stíla fyri koyriroyndum, útvega fólki koyrikort, umsita skráseting av koyrikortum og umsita akfaraskráseting, skrásetingargjald og vegskatt. Umframt høvuðsdeildina í Tórshavn, hevur Akstovan sýnsdeildir kring alt landið. Á Akstovuni starvast 20 fólk.*

AKSTOVAN
Hoyvíksvegur 57 • Postsmoga 3206 • FO-110 Tórshavn
Tel. 35 04 00 • Fax 35 04 01 • www.akstovan.fo • akstovan@akstovan.fo

**Verkfrøðingur**

Søkt verður eftir verkfrøðingi til projektering og eftirlit innan byggi- og anleggsarbeiði, har arbeiðsøki í høvuðsheitinum fevnir um projektering av stál- og betongkonstruktiónum.

Vit leggja dent á góð evnir at samstarva, og at tú megnar at arbeiða sjálvstøðugt og miðvíst.

Neyðugt er at hava kunnleika til arbeiði við AutoCad, Word og Excel. Telduforrit til statik v.m. kunnu lagast eftir egnum ynski, um tú ert vanur við onnur enn tey vit nýta.

Vit kunnu bjóða góðar arbeiðsumstøður og løn í mun til útbúgving og royndir. Møguligar útreiðslur í samband við flyting verða endurgoldnar sambært avtalu.
Hóast tú nýliga ert liðug/ liðugur við útbúgvingina ert tú vælkomin at søkja.

Skrivlig umsókn við viðkomandi skjølum skulu vera okkum í hendi innan 17.08.2007.
Umsóknin verður viðgjørd í trúnaði.

Nærri lýsing av starvinum kann fáast við at venda sær til Magnus P. Gaard á 515581, teldupostur mpg@vfs.fo

**Verfrøðingastovan**
Ráðgevandi verkfrøðingar F.R.I.
Mannbrekka 16, FO 188 Hoyvík
Telefon 315294, mail-vfs@vfs.fo